# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vit megna um vit vilja

Tú nýtist ikki at fara út í heim fyri at vera vitni til stórar og professionellar fiskarímessur. Hetta finnur tú eisini her á landi. Sum fiskivinnutjóð eru vit føroyingar noyddir til at fylgja við, at hava fingurin á pulsinum, soleiðis at vit vita, hvat fyriferst á fiskivinnuøkinum sum heild. Fyri at kunna hetta luttaka føroyskar fyritøkur javnan á fiskarímessum í útlandinum, og føroyingar við fiskivinnuáhugamálum eru eisini gestir á mongum av hesum fiskarímessum. Herfyri var risastór fiskarímessa hildin í Bruxelles, har ein føroyskur hópur varð við. Eitt er at vísa flaggið á slíkum framsýningum og fáa vitan frá øðrum, annað er at marknaðarføra okkum og okkara vørur og tænastur.

Men tað hevur eisini týdning, at vit sjálvi skapa okkum eitt messuumhvørvi. Tað hevur so verið gjørt í mong ár, har fiskarímessur hava verið hildnar bæði í Runavík og í stóru høllini á Sandvíkahjalla. Men krøvini gerast størri og størri og harvið eisini plássið. Tí hava stigtakararnir til stóru fiskarímessuna "Fish Expo Faroes 2009" tikið tað heldur óvanliga stigið at seta upp stór tjøld á niðara vølli í Gundadali.

Framsýningin lat upp í gjár og er opin til fríggjadagin seinnapartin. Á messuni eru umleið hálvthundrað framsýnarar úr Føroyum, Íslandi, Danmark, Noregi og Stórabretlandi. Her finnur tú nógv av tí, sum nútímans fiskivinna í dag brúkar. Vit hava brúk fyri at síggja, hvat aðrir framleiða og vit hava eisini brúk fyri at vísa øðrum, hvørjar vørur og tænastur okkara vinnulív kann bjóða fram. At vitja eina slíka framsýning gevur eisini okkum øllum her á landi, sum kanska ikki dagliga takast við fiskivinnu, eina fatan av, hvat okkara vinnufyritøkur hava at bjóða, ja hvussu fjølbroyttar og dugnaligar tær eru.

At vit her á landi, sum einans telja nærum 50.000 menniskju, eiga eitt so fjølháttað vinnulív á fiskivinnuøkinum og við so mongum góðum handverkarum og fakfólki annars, er einki minni enn eitt bragd. Nakað, sum vit eiga at vera errin og stolt av. Henda sannroynd er nettupp ein av loynidómunum aftanfyri, hvussu ein so lítil og fjarskotin tjóð megnar at standa á egnum beinum. Vitjið básarnar á messuni og tit fáa prógv fyri hesum. Takið virki sum Havsbrún, Vónina, JT Eletric, Nomatek, Oilwind fyri bara at nevna nøkur, ið eru við á messuni. Hesar borga allar fyri, at vit megna bara vit vilja. At Føroyar eisini eru eitt slag av royndarstað fyri allar hesar vinnur og fyritøkur er so ein av loynidómunum aftanfyri, at vit megna. Tað at hava alla vinnuna, sum skal brúka vørur og tænastur, her í landinum er jú lykilin til succeina. At kunna brúka hugflog og innovatión í eins egna umhvørvi til at menna vørur og tænastur er av alstórum týdningi, og hava eisini nógv ára royndir og menning av vørum gjørt, at føroyskar fiskivinnufyritøkur kunnu kappast við tær stóru í útlandinum. Vit hava fiskivinnuna so tætt inn at lívinum og gerandisdegnum, at hava vit tey røttu og úbúnu fólkini bæði í leiðslu og á gólvinum, so kunnu vit veruliga skapa nakað.

Fish Expo Faroes er avgjørd eina vitjan verd, ikki bara um tú er handilsfólk ella arbeiðir í fiskivinnuni. Nei hon er so sanniliga eisini gagnlig og áhugaverd fyri vanliga føroyingin fyri at fáa eina fatan av, hvat vit veruliga duga og megna. Og sjálvandi eisini at síggja, hvat onnur kunnu.

**Sosialurin**

## Setunarsteðgurin enn einferð!

**JARVIN F. HANSEN**
Formaður í Føroya pedagogfelag



Sum kunnugt, so hevur Trivnaðartænstan, sum er ein eind undir Nærverkinum, lýst setunarsteðg á økinum. Tað vil siga, at tað verður ikki lýst eftir pedagogum, hóast stórur tørvur er á pedagogum.

Fyri umleið einum ári síðani var Trivnaðartænastan í Danmark og luttók í Jobmatchtiltakinum. Endamálið við hesum tiltakið var, at fáa føroyingar við útbúgving at venda heimaftur til Føroyar, tí stórur tørvur var á útbúnum fólki – og at størvini trutu ikki.

Nú er vent í holuni. Ein av avleiðingunum av sparitiltøkunum hjá Nærverkinum var, at ongi nýggj fólk skuldi setast í starv – og at tað varð ikki lýst eftir fleiri fólkum. Hetta kom sum ein dyggur smeitur fyri teir nýútbúnu pedagogarnar, sum tóku prógv í februar mánaða – og sum høvdu ætlanir um at søkja starv innan Trivnaðartænustuna. Tey fáa snøgt sagt ikki eitt fast starv – og er hetta ein ótolandi støða fyri starvsfólk og tey, sum hava pedagogiska hjálp fyri neyðuni.

Haldi ikki, at vit, sum samfelag, bara kunnu sita og hyggja at hesum syndugu leiki, sum fer fram. Her má tann politiski myndugleikin koma uppí og gera sítt arbeiði til lítar, soleiðis, at økið ikki verður bumbað áratíggir aftur í tíðina.

Hetta er eisini ein háðan ímóti teimum, sum hava valt at taka eina útbúgving og ímóti pedagogiska yrkinum. Tað tykist verða løgið, at okkara fólkavaldu ikki tala at hesum átøkum, tí hetta er neyvan í tráð við tann politikkin, sum samgongan av fyrstan tíð valdi at føra. Tað sigur seg sjálvt, at tey ungu koma neyvan heimaftur eftir lokna útbúgving – og tað, sum kann henda er, at tey, sum hava fingið eina útbúgving í Føroyum, stinga í sekkin og fara av landinum.

Vit hava sæð at útbúgvingin er ikki nakað, sum skal raðfestast í hesum landi. Dømini um at Fróðskaparsetrið skal spara, er eisini eitt dømi um , at vit ikki raðfesta útbúgving – og vit ikki virða tey, sum hava eina útbúgving.

Føroya pedagogfelag átalar harðliga hendan seturnarsteðg og hevur felagið eisini umrøtt hendan spurning á norðurlendskum fundi við systurfeløg okkara. Úrslitið av hesum, var ein felags yvirlýsing, sum er send miðlunum í hesum døgum.

## Deklaration

Nordiske fagforeninger for Socialpædagoger (NFFS) har på deres sidste møde, den 2. og 3. maj, omtalt ansættelsesstoppet på det sociale område på Færøerne.

Vi vil påvise at den måde hvorpå besparelser bliver sat i gang har mange negative følger.

- For brugerne af tjenesten
- For de ansatte
- For samfundet

Faglige sociale ydelser tager lang tid at opbygge. Derfor kan ansættelsesstoppets følger være katastrofale for området. Med færre ansatte bliver arbejdsbyrden fordelt over de få ansatte i området og kommer det at medvirke til et større stress niveau og en forværring af allerede dårlige arbejdes forhold.

Samtidigt er handlingen uforståelig når der allerede mangler uddannede mennesker på området og de nyuddannede mennesker ikke kan komme i de allerede manglende stillinger.

På det samfundsmæssige niveau vil det så mærke en forværring af vilkårene for de allerede dårligt stillede mennesker som har brug for tjenesten.

**På NFFS møde i København, 3. Maj 2009**

- *Salóme Þórisdóttir, formaður, Þroskaþjálfafélag Íslands*
- *Benny Andersen, næstformand, Socialpædagogerne Danmark*
- *Siv Karen Kjølmoen, næstformand, Fo Norge*
- *Kaalina Skifte, Formand, PIP Grønland*
- *Freddy Gustavson, formand, Sverige*
- *Anja Kylen, formand, Talentia Finland*
- *Jarvin Feilberg Hansen, formand, Føroya pedagogfelag, Færøerne*

**På vegne av NFFS (Nordisk forbund For Sosialpædagoger)**

- *Salóme Þórisdóttir, formaður, Þroskaþjálfafélag Íslands*

## Et velfærdssamfund

**NINA DAHL**

Betal din skat med glæde! Omend jeg ikke betaler den med glæde, så betaler jeg min skat til fællesskabet i forventning om til gengæld at kunne få visse ydelser.

Det grundliggende under ethvert moderne samfund er uddannelse. De unge først, bliver der sagt, så må andet vente.

Færøerne er et industrisamfund (vil jeg mene ) i overgangen til et servicesamfund.

En høj grad af fleksibilitet er en af de ting, der kendetegner servicesamfundet, at arbejdskraften er så veluddannet, at den hurtigt kan tilegne sig ny viden og tilpasse sig et arbejdsmarked i stadig forandring.

I sidste uge kom breve ud til de unge, der havde søgt ind på F.H.S., H.H.og gymnasiet. Desværre var det ikke alle, der fik et positivt svar.

En arbejdskraft, der er så veluddannet, at den hurtigt kan tilegne sig en ny viden og tilpasse sig et arbejdsmarked i stadig forandring---ja, det bliver svært, når der ikke engang er plads til alle på ungdomsuddannelserne, og så kan jeg da begynde og blive alvorlig bekymret for, hvor pengene til min frentidige alderdomsforsørgelse skal komme fra.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.